e-mail: jakup@sosialurin.fo
# Ítróttur
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ítróttin á www.sosialurin.fo**

# Steypadreymurin hvarv

*Eftir 120 ferðmiklar minuttir móti AB, sum at enda máttu avgerast við brotsspørkum, noyddist liðið hjá Toda Jónsson, FCK, at siga farvæl til steypavónir sínar*

JÁKUP MØRK/ÁLVUR HARALDSEN ÚR KEYPMANNAHAVN

Karmarnir vóru so at siga perfektir, tá FC Keypmannahavn á heimavølli tók móti AB í donsku steypakappingini. Talan var um fjórðingsfinalu, og undan dystinum varð nógv tosað um, at víðari luttøka í steypakappingini, vildi verið eitt stórt plástur á sárið hjá FCK, sum ikki hevur havt tað serliga lætt hetta kappingarárið.

At úrslitini hjá stórfelagnum ikki hava verið eftir vild, gav ítróttarstjórin, Niels Christian Holmstrøm eisini til kennar, tá hann undan dystinum helt eina lítla røðu fyri stuðlunum hjá felagnum. Í hesi segði hann millum annað, at um heimaliðið vann dystin, høvdu teir vunnið tríggjar dystir á rað, og at hetta mátti metast sum nakað heilt serligt.

### Todi týdningarmikil
Føroyski landsliðsleikarin, Todi Jónsson, hevur ikki verið so nógv at sæð seinastu tíðina, tí hann hevur drigist við ein skaða í knænum. Sambært stjóranum í FCK, Flemming Østergaard, er hetta helst eisini ein av orsøkunum til, at úrslitini ikki hava verið so góð. Hann legði dent á, at felagið hevði verð á venjingarlegu í Suðurafrika, áðrenn landskappingin byrjaði aftur, og á hesi hevði føroyingurin verið avgjørt besti maður á liðnum. Hann legði eisini afturat, at um tað var nakar einstakur leikari, sum AB-leikararnir vóru bangnir fyri, so var tað júst Todi Jónsson.

Helst var tað ikki bert stjórin, sum setti stórt álit á Toda. Í øllum førum høvdu fyrireikararnir eisini valt, at leikarin við 12-talinum á rygginum skuldi prýða forsíðana á leikskránni hendan dagin.

Nú skal ikki verða sagt, at tað var orsakað av føroyska landsliðsleikaranum, men veruleikin var í øllum førum, at FC Keypmannahavn hevði greiða yvirvág fyrstu 45 minuttirnar. Fleiri ferðir spældu teir seg væl út um AB-verjuna, har Todi í vinstra og Thomas Thorninger í høgra borði komu ígjøgnum fleiri ferðir.

### Todi snýttur
Verjuleikararnir hjá útiliðnum høvdu sostatt úr at gera, og mangan vórðu ólógligir hættir nýttir, til tess at steðga álopum hjá heimaliðnum. Ta einu ferðina var eisini líkt til, at brot varð fram móti Toda í brotsteiginum, men hóast bæði áskoðarar og leikarar vildu hava brotsspark, so lat dómarin, Kim Milton Nielsen ikki við seg koma.

Tað var eisini líkt til, at hendingin tók nakað av spæliglæðini frá føroyska landsliðsleikarunum. Mótmæli hansara hjálptu lítið, og kanska vóru tey eisini viðvirkandi til, at dómarin nakað seinni gav honum gula kortið, tá hann metti, at føroyingurin hevði spælt sjónleik, tá beinini vórðu tikin undan honum.

Stutt fyri hetta, hevði FCK lagt seg framum. Nýggi álopsleikarin, Sibosiso Zuma, dróg framvið mótstøðuleikara og spældi 1-2 spæl við eins nýggja álopsfelaga sín, Harald Brattbak, og endin varð, at Zuma kundi leggja bóltin í netið.

Frøin var sjálvsagt stór á teimum gott 10.000 áskoðarunum, og næstu løtuna koyrdu teir áhaldandi á lið sítt. Merkisvert í hesum sambandi er, at hóast 10.000 áskoðarar ikki ljóðar av so øgiliga nógvum, so var gangurin av hesum øgiligir, og takkað verið takinum í Parkini, gjørdist ljóðið enn ógvusligari, so tað má sigast at vera gleðiligt, at toftamenn nú arbeiða við at leggja tak á Svangaskarð.

### Orkan gekk undan
Restina av fyrra hálvleiki var tað sostatt FCK, sum hevði leikligu yvirvágna, og í hálvleikinum snúi mesta prátið millum áskoðararnar seg sum, hvørt tað fór at eydnast at økja um leiðsluna.

Hetta hendi tó ongantíð, og í veruleikanum var tað rættuliga langt frá, at so varð. AB legði nevnliga nógv bragdligari fyri í seinna hálvleiki. Pressið varð flutt nógv longur fram á vøllin, og hetta hóvaði als ikki teimum á heimaliðnum.

Tað tóktist eisini greitt, at orkan á heimaliðnum heldur ikki var nóg góð til áhaldandi at trýsta mótstøðuliðið, og eisini hjá Toda Jónssyni. Eftir at hann enn einaferð varð feldur, uttan at dómarin lætst um vón, gjørdi venjarin av at skifta hann út, og tað var heldur ikki líkt til, at føroyski leikarin hevði nakað ímóti hesum.

Hetta linkaði tó ikki um trýstið á FCK málið, og tá hálvleikurin var á leið hálvrunnin, gekk galið. Niclas Jensen drálaði við bóltinum, og endin varð at Jan Michaelsen vann bóltin av honum. Hann setti beina kós móti málinum, og hóast málverjin í fyrstu atløgu fekk vart fyri, endaði alt við, at Rasmus Daugaard sendi bóltin í tóma netið.

### Sigurin var í lagi
Restina av dystinum var tað framhaldandi AB, sum hevði nógv tað vandamesta spælið, og hóast David Nielsen hevði einar tveir møguleikar, so lá tað alla tíðina í luftini, at skuldi ein vinnari finnast, so varð tað útiliðið.

Soleiðis varð eisini, men tað var ikki fyrr enn eftir longda leiktíð og brotssparkskapping, at heimaliðið mátti geva skarvin yvir.

Teir á heimaliðnum góvust tó ongantíð at stríðast, og móti endanum var nær við, at rættuligt rok tók seg upp. Heta hendi, tá Jan Michaelsen tvær reisur innan stutta løtu sendi albogan í andlitið á Niclas Jensen. Fyrru ferðina viðførdi hetta onga revsins, meðan dómarin seinnu ferðina vísti gula kortið, og tað var sjónligt, at FCK leikararnir hildu hetta vera í minna lagi. Mótmæli teirra hjálptu tó lítið, og við fullari manning, helt AB áfram við at mynda dystin, sum teir at enda vunnu.

Sostatt varð víðari luttøkan hjá FCK av ongum, og tað var eisini sjónligt, at leikararnir vóru vónbrotnir um tapið. Tað høvdu teir eisini alla orsøk til, tí um væl vildi til, kundu teir avgjørt dystin í fyrra hálvleiki, men sum dysturin leið, var tað als ikki órættvíst, at tað at enda varð AB, sum vann seg fram til hálvfinaluna í steypakappingini.



*Ónøgdir FCK leikarar, tá dómarafloytan tagdi, eftir at Todi Jónsson varð feldur inni í brotsteiginum*



*Seinasta tíman ella so, mátti Todi sita á pínubeinkinum, meðan liðfelagarnir stríddust*



# Ein katastrofa

*Todi Jónsson helt lítið um avrikið hjá dómaranum, Kim Milton Nielsen*

JÁKUP MØRK/ÁLVUR HARALDSEN ÚR KEYPMANNAHAVN

Tað var ein sjónliga vónbrotin Todi Jónsson, sum hittu tykkara útsendu blaðmenn eftir dystin.

Sjálvur hevði hann sitið á skiftibeinkinum í góðan tíma, eftir at hann tíðliga í seinna hálvleiki varð skiftur út. Um útskiftingina helt hann tó, at hetta var í lagi.

- Eg havi júst verið skaddur, og nú havi eg leikt tríggjar dystir innan eina viku, so tað er klárt, at eg eri rættuliga troyttur, greiddi Todi frá.

Var Todi nøgdur um útskiftingina, so var hann alt annað enn nøgdur við dømingina.

- Hasin dómarin var ein skandala. Hann dømir ikki eitt klokkuklárt brotsspark, og so fái eg eisini kort fyri at filma seinni í dystinum. Harafturat sleppur ein hjá teimum (Jan Michaelsen, blðm.) við gula kortinum, eftir at hann tvær ferðir slær Niclas Jensen við alboganum, greiddi landsmaður okkara frá.

### Europa livir enn
Spurdur um, hvørji mál teir nú hava eftir á árinum, svara Todi, at nú mugu teir bara royna at verða meistarar. Hesin dreymur tykist tó nakað fjarur, og hetta ásannar hann eisini við einum smíli.

Hann leggur tó afturat, at teir als ikki hava uppgivið at koma út í Europa komandi ár. Hetta krevur tó, at teir megna at stríða seg upp millum 4 ella fimm tey ovastu liðini.

Í løtuni eru tó fleiri lið omanfyri FCK í dystinum um europeisku plássini, men skal stjóri felagsins takast í álvara, eru útlitini nógv batnaði, nú føroyski landsliðsleikarin aftur er til reiðar at tørna út fyri høvuðssataðarfelagið.




*Leikskráin til dystin, við mynd av Toda á permuni*



*Ein vónbrotin Todi Jónsson eftir dystin mikukvøldið*

# Ein hálvleikur ikki nóg mikið

*Eftir tapið móti AB, hittu vit hjálparvenjaran hjá FCK, Henrik Larsen*

JÁKUP MØRK/ÁLVUR HARALDSEN ÚR KEYPMANNAHAVN

Tað var ein heldur fámæltur Henrik Larsen, sum vit hittu eftir dystin mikukvøldið.

Fyrrverandi europameistarin helt, at orsøkin til tapið fyrst og fremst var tann, at AB spældi sera væl eftir hálvleikssteðgin.

- Teir spæla nógv betur enn vit, og hetta kom eisini til sjóndar í brotssparkskappingini, har teirra sjálvsálit var væl størri enn okkara.

Henrik Larsen helt eisini, at hansara egna lið ikki megnaði nóg væl at halda bóltin í egnari røð. – Í fyrra hálvleiki gekk okkara spæl heilt væl, men seinni vóru alt ov nógvir óneyðugir feilir, og tí var tað helst eisini í lagi, at AB vann dystin, greiddi hjálparvenjarin frá.

Hann legði eisini dent á, at tað er ikki nóg mikið at spæla ein góðan hálvleik, og eisini helt hann, at liðið átti at víst meira, nú teir vóru á heimavølli.

»Store« endaði við enn einaferð at endurtaka, at AB liðið spældi ein góðan dyst, har teir serliga eftir steðgin stóðu væl í verjuni, soleiðis at heimaliðið ikki fekk álopsspælið at koyra, sum teir vildu hava tað.




*Lagið á stóra hjálparvenjaranum var einki serligt, tá tapið varð veruleiki*

**Ítróttar-Sosialurin er har tað hendir**